NES KOMMUNA

650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# KUNNGERÐ

**um framløgu av broytingaruppskoti av býarskipan og byggisamtykt fyri Nes kommunu.**

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 av 21. mai 1954 við seinni broytingum, hevur kommunustýrið á fundi hin 25.06.2007 samtykt at gera broytingar í býarskipanina og byggisamtyktina fyri Nes kommunu.

**NES**
Broytingin á Nesi umfatar:

C4 øki á matr. nr. 56. verður broytt til nýtt A2 øki

Nýggjar ásetingar fyri D5-øki á matr. nr. 155, sunnan fyri matr. nr. 56 Nes bygd.

**TOFTIR**
Nýtt A2 øki frá Vesturskin og norður til Høganesveg.

D3 øki verður broytt til eitt A2 øki og eitt D2 øki.

Broytingarnar eru lýstar við litaðum kortum og uppsløgum, sum eru til skjals á Teknisku deild á kommunuskrivstovuni í vanligu upplatingartíðunum frá 23. juli til 27. aug. 2007

**Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagið 23. okt. 2007.**

**NES KOMMUNA**

EL-SERVICE

FO-480 Skála · Faroe Islands · www.el-service.fo
Tlf. 47 19 00 · Fax. 47 19 01 · el-service@el-service.fo

## Goymslulærlingur

**Vit sóknast eftir goymlsulærlingi.**

Eitt spennandi starv, har viðkomandi við tíðini sleppur at royna seg innan vørukeyp, ger av tilboðum og sum heild vera ein partur av dagliga arbeiðnum

**Uppgávurnar koma at fevna um:**
- Avgreiðslu av viðskiftafólki
- Røkt av goymsluni
- Bílegging av vøru
- Annað fyrifallandi arbeiði

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur áhuga fyri el-arbeiði.

Um tú heldur, at hetta er nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn við møguligum viðmælum.

Hevur tú spurningar til starvið ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

Á El-Service arbeiða uml. 50 fólk, tey flestu hava el- og maskinútbúgving. Vit arbeiða við framleiðslu, innstallatión, eldsløkkiútgerð og offshore. Størsti parturin av okkara veitanum og framleiðslu fer til útflutnings. Vit leggja stóran dent á góðsku og eru ISO-9001 góðkent.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# SLØKKILIÐSFÓLK

## TIL FUGLAFJARÐAR SLØKKILIÐ

Fuglafjarðar kommuna søkir hervið eftir 1 leysum sløkkiliðsfólki M/K til Fuglafjarðar sløkkilið til setan 1. september 2007 ella skjótast eftir hetta.

Sum treyt verður sett, at viðkomandi skulu hava heilsuváttan, revsiváttan og stóra koyrikortið. Tó kunnu persónar, sum ikki lúka krøvini fyri koyrikorti, søkja størvini við teirri treyt, at hetta verður fingið til vega skjótast, um teir verða settir í starv.

Somuleiðis verður kravt, at umsøkjarar antin hava ella skulu taka neyðugt grundskeið í 1. hjálp. Neyðuga víðari útbúgving sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsfólkum skipar Fuglafjarðar sløkkilið fyri.

Nærri upplýsningar um starvið eru at fáa frá brunastjóranum William S. Askham á telefon 737800.

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður **í hendi í seinasta lagi 03. august 2007 kl. 15.00.**

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður 16. juli 2007*

**Fuglafjarðar kommuna**



# Listaframsýning á ólavsøku

Lions Club Tórshavn skipar aftur í ár fyri listaframsýning í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku.
Opið verður 28. - 30. juli.
Hevur tú hug at taka lut í hesi framsýning, set teg so í samband við Lions Club Tórshavn á telefon 213450, 216561, 210299, 314400, 312341 ella 313788 áðrenn 23. juli.
Vinningurin av málningasøluni fer til vælgerandi endamál.

**LIONS CLUB TÓRSHAVN**

## Skrivari til Ílegusavnið og Fyribyringarráðið

Eitt 3/4 starv sum skrivari hjá Ílegusavninum og Fyribyrgingarráðnum er leyst til setan skjótast tilber.

**Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum:**
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Rættlestur og journalisering
- Málsfyrireiking
- At samskipa fundir
- Samskifti við viðskiftafólk og ráðgevar/samstarvsfelagar

**Vit hugsa okkum at tú hevur:**
- Skrivstovuútbúgving, korrespondent ella aðra líknandi útbúgving/royndir
- Kunnleika til almenna fyrisiting
- Kunnleika til enskt og hollan kunnleika til skrivligt føroyskt
- Kunnleika til skrivstovuforrit á brúkarastøði
- Góð samstarvs- og samskipanarevni
- Áhuga fyri heilsuøkinum

**Vit bjóða:**
Eitt fjølbroytt starv, sum tú sjálv/ur verður við til at skapa, til tíðir strævið, men samstundis áhugavert og mennandi, við góðum skeiðs- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Lønar – og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Setanarmyndugleiki er Ílegusavnið. Setanarøkið fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sigurð á 59 10 20 ella Katrin á 21 51 65.

**Umsókn:**
Umsókn við lívsrensli, avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til:

**Ílegusavnið**
Eirargarður 2
100 Tórshavn
ella til: t-post: genetics@ahr.fo

Freistin at søkja er **fríggjadagin 10. august 2007 kl. 14.**

Fá meiri at vita um stovnarnar á: www.genetics.gov.fo og www.fyribyrg.fo

Ílegusavnið
Genetics Resource Centre

Fyribyrgingarráðið

# Høli til leigu



Handilshølið og íbúð á Glyvrum til leigu.

Hvør hæddin er 120 m².

**Ring 21 45 44**